Eysturkommuna

# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 19.12.2024 kl. 17:00 |
| **Málnr.:** | |
| Nevndarlimir: | Per Martin Gregersen<br>Katrin Kjartansdóttir<br>Magnus Skoralíð<br>Marjun Andreasardóttir<br>Rúni Justinussen<br>Marita Klein Joensen<br>Petur Súni Jacobsen<br>Hjalti Dalheim<br>Hanna Jensen |
| Varalimir: | |
| Ikki møtt: | |
| Nevndarskrivari: | Erik Lervig |


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Til viðgerðar:** | | | |
| 69/24 | 24/00683-2 | Frágreiðing og tilmæli - eykajáttan november 2024 | 3 |
| 70/24 | 24/00618-3 | Umbøn um ummæli - Keyp av parti av matr. nr. 290a SG (Undir Gøtueiði) - Búnaðarstovan | 4 |
| 71/24 | 24/00619-2 | Umsókn um keyp av parti av matr. nr. 290a SG (undir Gøtueiði) | 5 |
| 72/24 | 24/00322-2 | Útstykking í Syðrugøtu - Niklasmørk | 6 |
| 73/24 | 24/00039-4 | Umsókn um byggiloyvi til umbygging - matr. nr. 189 SG | 8 |
| 74/24 | 24/00419-3 | Broyting av býarplani - matr. nr. 72f og 65a í Norðragøtu | 10 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 75/24 | 24/00559-8 | Umsókn um byggiloyvi - Trafostøð á matr. nr. 72f í Norðragøtu - SEV | 13 |
| 76/24 | 24/00697-4 | Serstøk byggisamtyktini fyri matr. nr. 339m og 339aq í Fløtugerði - Leirvík | 15 |
| | | | |

**Til viðgerðar:**

## 69/24 Frágreiðing og tilmæli - eykajáttan november 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 25.11.2024 | 44/24 | 24/00683-2 |
| 2 Býráðið | 28.11.2024 | 67/24 | 24/00683-2 |
| 3 Fíggjarnevnd | 17.12.2024 | 45/24 | 24/00683-2 |
| 4 Býráðið | 19.12.2024 | 69/24 | 24/00683-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Talan er um fleiri ymiskar eykajáttanir (sí fyrliggjandi notat) á íalt 9.070.000,00 kr. Harav 100 t.kr eru til rakstur og rest eru løgujáttanir. Allar eykajáttaninar verðar fíggjaðar innan verandi fígjarætlan. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Av tí at allar eykajáttaninar verða fíggjaðar innan verðant fíggjarætlan hevur hetta ongar avleiðingar uttan tær at nakrar løgujáttanir lækka og aðrar hækkað. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at veita eykajáttanir á íalt 9.070.000,00 kr. sum greitt er frá í fyriliggjandi notati. |

**Fíggjarnevnd 25. november 2024**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 28. november 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**Fíggjarnevnd 17. desember 2024**
Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan eins og samtykt við 1. viðgerð.

**Býráðið 19. desember 2024**
Einmælt samtykt eins og við 1. viðgerð.

## 70/24 Umbøn um ummæli - Keyp av parti av matr. nr. 290a SG (Undir Gøtueiði) - Búnaðarstovan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 12.12.2024 | 49/24 | 24/00618-3 |
| 2 Býráðið | | | 24/00618-3 |
| 3 Fíggjarnevnd | 17.12.2024 | 46/24 | 24/00618-3 |
| 4 Býráðið | 19.12.2024 | 70/24 | 24/00618-3 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið teldupost dagfest 19. november 2024 frá Búnaðarstovuni, har heitt verður á kommununa, um at ummæla eitt keyp av parti av festinum matr. nr. 290a Undir Gøtueiði, svarandi til umleið 155 fermetrar, at leggja aftrat matr. nr. 290b Undir Gøtueiði.<br><br>Sí skjøl í málinum. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at taka undir við ummælinum hjá Búnaðarstovuni. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 12. december 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 17. desember 2024**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini

**Býráðið 19. desember 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

## 71/24 Umsókn um keyp av parti av matr. nr. 290a SG (undir Gøtueiði)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 12.12.2024 | 50/24 | 24/00619-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 17.12.2024 | 47/24 | 24/00619-2 |
| 3 Býráðið | 19.12.2024 | 71/24 | 24/00619-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið teldupost dagfest 14. oktober 2024, har søkt verður um at keypa part av matr. nr. 281a Undir Gøtueiði, at leggja aftrat matr. nr. 290b.<br><br>Umsitingin hevur viðgjørt hetta, og metur, at til ber at selja part av matr. nr. 281a, svarandi til viðfest kort "Víðkan av matr. nr. 290b Undir Gøtueiði.<br><br>Sí skjøl í málinum. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at selja umleið 55 fermetar av matr. nr. 281a, at leggja aftrat matr. nr. 290b. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 12. december 2024**
Byggi- og býarskipanarskipanin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 17. desember 2024**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini

**Býráðið 19. desember 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

## 72/24 Útstykking í Syðrugøtu - Niklasmørk

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 24.04.2024 | 14/24 | 24/00322-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 17.12.2024 | 48/24 | 24/00322-2 |
| 3 Býráðið | 02.05.2024 | 21/24 | 24/00322-2 |
| 4 Byggi - og býarskipanarnevnd | 12.12.2024 | 52/24 | 24/00322-2 |
| 5 Fíggjarnevnd | | | 24/00322-2 |
| 6 Býráðið | 19.12.2024 | 72/24 | 24/00322-2 |

**Málslýsing:**

Eysturkommuna hevur ætlanir um at gera útstykking á Niklasmørk í Syðrugøtu øki er umleið 20.000 fermetrar.

Umsitingin hevur fingið gjørt 3 uppskot til hetta.

Uppskot 1:
Er ein blanding av sethúsum og raðhúsum. Í Uppskotinum eru 8 grundsøkir til sethús, støddin er millum 480 og 630 fermetrar, umframt eru 16 grundøkir til raðhús ið eru umleið 212 fermetrar, umframt er vegur og 1000 fermetrar til alment gagnligt virksemi.

Uppskot 2:
Er bert raðhús. Í uppskotinum eru 31 grundøkir til raðhús ið eru umleið 212 fermetrar, umframt vegur og 1000 fermetrar til gagnligt virksemi.

Uppskot 3:
Er ein blanding av raðhúsum og íbúðum. Í uppskotinum eru 14 grundøkir til raðhús ið eru umleið 212 fermetrar, og 5 bygningar við 8 íbúðum í hvørjum bygningi tilsamans 40 íbúðir, umframt vegur og 1000 fermetrar til alment gagnligt virksemi.

Sí viðfesta uppskot.

Umsitingin mælir til at taka av uppskoti 1, tí hetta uppskoti hevur eina blanding av bæði raðhúsum og sethúsum.

**Ískoyti 16.12.2024**
Umsitingin hevur arbeitt við at gera ráðgevarasáttmála um projektering av útstykkingini á Niklasmørk í Syðrugøtu. Ráðgevarasáttmálin umfatar projekteringsleiðslu, projektering av anleggsarbeiði, tekniskum skipanum og el-arbeiði, sí skjal í málinum.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

| |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til, at taka av tilmælinum hjá umsitingini.<br><br>**Ískoyti 16.12.2024**<br>Umsitingin mælir til, at taka undir við ráðgevarasáttmálanum og fáa hendan undirskrivaðan. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 24. april 2024**
Byggi- býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 02. mai 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 12. december 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 17. desember 2024**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipananevndini,

**Býráðið 19. desember 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini

# 73/24 Umsókn um byggiloyvi til umbygging - matr. nr. 189 SG

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 12.12.2024 | 46/24 | 24/00039-4 |
| 2 Býráðið | 19.12.2024 | 73/24 | 24/00039-4 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið umsókn um útbygging av sethúsum  á matr. nr. 189 í Syðrugøtu.<br><br>Ætlanin er, at byggja omaná verandi betonggarð móti vegnum Fyri oman Brúgv.<br><br>Sum er, eigur Kommunan eina ál innanfyri garðin, men hevur kommunan játtað at selja henda partin til matr. 189. Umsóknin er send til Umhvørvismálaráðið.<br><br>Bygningurin stendur nærri markinum enn 2,50 m, sum fleiri onnur hús í hesum eldra býlingi í Syðrugøtu, men fráleikin er meira enn 5,00 m til nærmasta hús.<br><br>Víddin á grundstykkinum er 251 fermetrar.<br><br>Brot úr byggisamtyktini, ásetingar fyri §3 øki B: Bústaðarøki<br><br>Sambært omanfyri nevndu ásetingum í byggisamtyktini, er loyvt at umvæla verandi sethús og byggja aftrat teimum til nútímans nýtslu. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli:** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at geva byggiloyvi, treyta av, at bygt verður sambært krøvunum í BK17. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 12. december 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 19. desember 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

# 74/24 Broyting av býarplani - matr. nr. 72f og 65a í Norðragøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 20.06.2024 | 23/24 | 24/00419-3 |
| 2 Býráðið | 27.06.2024 | 37/24 | 24/00419-3 |
| 3 Byggi - og býarskipanarnevnd | 19.09.2024 | 33/24 | 24/00419-3 |
| 4 Býráðið | 03.10.2024 | 48/24 | 24/00419-3 |
| 5 Byggi - og býarskipanarnevnd | 12.12.2024 | 47/24 | 24/00419-3 |
| 6 Býráðið | 19.12.2024 | 74/24 | 24/00419-3 |

**Málslýsing:**

Ynski er um, at broyta part av matr. nr. 72f og 65a frá øki H, Frílendi til øki E, Almennir stovnar, og at matr. nr. 72g verður allur gjørdir til øki E, Almennir stovnar. Hetta fyri at framtíðartryggja møguliga útbygging av Gøtubrá í Norðragøtu.

**Lýsing, verandi støða:**

- Matr. nr. 72g liggur í dag sum øki E, Almennir stovnar og ein partur av matriklinum liggur sum øki B1, Alternativ íbúðarbygging.
- Matr. nr. 65a liggur í dag sum øki H, Frílendi.
- Partur av matr. nr. 72f liggur sum øki H, Frílendi.

**Lýsing, framtíðar støða:**

- Matr. nr. 72g verður broyttur til øki E, Almennir stovnar.
- Partur av matr. nr. 72f skal broytast frá øki H, Frílendi til øki E, Almennir stovnar, sí kortskjal.
- Partur av matr. nr. 65a skal broytastt frá øki H, Frílendi til øki E, Almennir stovnar, sí kortskjal.

Mælt verður til, at gera hesar broytingar í býarætlanini.

**Ískoyti 23.09.2024.**
Vísandi til broytingar á matr. nr. 72f, 65a og 72g, er eisini neyðugt at gera aðrar tillagingar á niðanfyri nevndu matriklum. Talan er, um at tillaga verandi byggisamtykt við matrikul linjur.

Broytingin fevnir um matrikul nr., í Norðragøtu, 65a, 28e, 72x,
65b, 72c, 72v, 63a, 62, 72f, 25a, 72g, 31a og litra n.

Víst verður til viðfesta kortskjal í málinum.

**Ískoyti 12.12.2024**
Vísandi til broyting av býarplani - matr. nr. 72f og 65a í Norðragøtu, hevur Eysturkommuna móttikið eitt mótmælisskriv meðan broytingin hevur ligið alment frammi.

| |
|---|
| Umsitingin hevur sent svarskriv viðvíkjandi mótmælisskrivinum, og givið eina frágreiðing um máli, eins og tað verður biði um. Einki aftursvar er móttikið.<br><br>Sambart Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022, skal støða takast til, um býráði tekur undir við mótmælinum ella ikki.<br><br>Tekur býráði undir við mótmælinum, er neyðugt at tilfari verður lýst av nýggjum og lagt alment fram. Um býráði ikki undir við mótmælinum, verður máli sent beinleiðis til Umhvørvismálaráði saman við mótmælisskrivinum til støðutakan.<br><br>Víst verður til skjøl í málinum. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til, at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.<br><br>**Ískoyti 23.09.2024**<br>Umsitingin mælir til, at taka undir við broytingunum í býarplaninum.<br><br>**Ískoyti 12.12.2024**<br>Umsitingin mælir til, at senda tilfari til Umhvørvismálaráði. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 20. juni 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 27. juni 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Byggi – og býarskipanarnevndini

**Byggi - og býarskipanarnevnd 19. september 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingin.

**Býráðið 03. oktober 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Byggi – og býarskipanarnevndini dagf. 19. september 2024

**Byggi - og býarskipanarnevnd 12. december 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 19. desember 2024**
Einmælt samtykt at taka undir vð tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

# 75/24 Umsókn um byggiloyvi - Trafostøð á matr. nr. 72f í Norðragøtu - SEV

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 12.12.2024 | 48/24 | 24/00559-8 |
| 2 Býráðið | 19.12.2024 | 75/24 | 24/00559-8 |

**Málslýsing:**

Eysturkommuna hevur móttikið umsókn frá SEV um loyvi at byggja eina trafostøð framvið Sjúrðargøtu í Norðrgøtu, í samband við byggingina í Eyðabø.

Umsitingin metti ikki, at hetta var ein góð staðseting av trafostøðini, og hevur víst á matr. Nr. 88q ið liggur norðanfyri Eyðabø. Hetta hevur SEV góðtikið.

Eisini er SEV biðið um, til at byggja trafostøðina inn í lendið, so hon ikki verður so sjónlig. Vit hava tí biðið SEV um ein tvørðskurð og síðumyndir sum lýsir staðsetingina betri.

Øki sum umsitingin mælir til at staðseta trafostøðina er eitt ”F øki: Almenn frítíðar- og mentanarøki”.

Ásetingarnar fyri økið, geva loyvið til at byggja hús, ið samsvara við endamálið við avvarandi økispartar og tænastuvirksemi.

Tá byggingin ikki samsvarar við omanfyri nevndu endamál, verður neyðugt við fráviki til byggingina.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli**

Umsitingin mælir til, at geva frávik at byggja trafostøðina á omanfyri nevndu staðseting.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 12. december 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 19. desember 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

## 76/24 Serstøk byggisamtyktini fyri matr. nr. 339m og 339aq í Fløtugerði - Leirvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 12.12.2024 | 51/24 | 24/00697-4 |
| 2 Býráðið | 19.12.2024 | 76/24 | 24/00697-4 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Serstøk byggisamtykt er gjørd fyri matr. nr. 339m og 339aq í Fløtugerði í Leirvík.<br><br>Grundøkini liggja í einum B2 økið ið er eitt bústaðarøki við serstakara byggisamtykt.<br><br>Hesir matriklar skulu broytast frá at verða eitt “B2 økið við serstakari byggisamtykt” til at verða eitt “B1 øki Alternativ íbúðarbygging”.<br><br>Sí skjøl í málinum. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at taka undir við broytingini. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 12. december 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 19. desember 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

fundurin lokin kl. 18.00

Per Martin Gregersen

Katrin Kjartansdóttir

Magnus Skoralíð

Marjun Andreasardóttir

Rúni Justinussen

Marita Klein Joensen

Petur Súni Jacobsen

Hjalti Dalheim

Hanna Jensen